# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Feløgini mugu traðka fram

Aðalfundurin hjá føroyskum fótbólti staðfesti leygardagin, at nýggjur forseti skal valda komandi tvey árini.

At velja nýggjan ovasta er demokratiski rætturin hjá feløgunum, og við skiftinum tykist kósin eisini vera løgd á ein bógv, har feløgini sjálvi koma at hava størri ávirkan á tær avgerðir, sum verða tiknar í FSF.

Tað er ein leið, sum feløgini valdu at stuðla, men tey skulu samstundis vera greið um, at hetta eisini er ein leið, sum setir størri krøv til somu feløg. Kravið er nú, at feløgini vilja og tora standa fram við síni hugsan um tey viðurskifti, sum eru galdandi fyri føroyskan fótbólt. Í slíkari støðu hjálpir ikki at krógva seg millum aðalfundirnar, fyri síðani at tutla sínamillum um ónøgd.

Og tað var eisini boðskapurin, sum Høgni í Stórustovu fram um alt hevði til aðalfundin. At feløgini traðka í karakter sum eigarar av FSF. Og at nevndin í so máta virkar sum tænarin hjá aðalfundinum.

Samstundis gjørdist talan um eitt sorgblítt farvæl til Óla Holm, sum seinastu 25 árini hevur verið við til at mynda føroyskan fótbólt. Óli var partur av liðnum, sum í 80'unum dróg føroyskan fótbólt á altjóða pallin. Ikki altíð hava avgerðirnar verið eins lættar at tikið, og mótstøðan frá bæði feløgum og fólkinum hevur til tíðir verið stór.

Tey tøk, sum kortini vórðu tikin, hava uttan nakran iva lyft føroyskan fótbólt míl frameftir. Samstundis hava somu tøk tó viðført økt krøv til feløgini. Krøv, sum feløgini til tíðir hava havt ilt við at nøkta, og tað hevur aftur skapt nakað av ónøgd millum feløgini.

Um nýggi forsetin megnar at venda hesi ónøgd, veldst fyrst og fremst um, hvørt hann megnar at fáa lyft samspælið millum partarnar. Tað verður størsta takið komandi tvey árini. Eitt tak, sum føroyskur fótbóltur ikki hevur ráð til at kiksa.

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**Fjúrtandi partur**

Onkur spyr: "Hvaðani kemur bíblian, hvussu kunnu vit vita, at hon er tað rætta. Hvør hevur savnað hesar 39 bøkurnar í Gamla Testamenti og tær 27 í Nýggja Testamenti saman í hesa bókina, sum kallast bíblian?" Bíblian gevur okkum sjálv svarið. Paulus sigur tað soleiðis í Rómbævinum:

Hvat hevur tá Jødin framum? Ella hvat nyttar umskeringin?

Nógv á allan hátt! Fyrst og fremst tað, at orð Guds eru litin teimum upp í hendur. Rómbr.3,1-2.

Gud hevur havt sína ætlan við okkum menniskjum og hevur útført hana við at útvelja jødarnar. Teir eru á ein serligan hátt útvaldir av Gudi frammum aðrar tjóðir. Jesus sigur sjálvur, í Jóh. ev. fjórða kapitli, við ta samversku kvinnuna, at "frelsan kemur frá jødunum". vers 22.

Lat okkum staðfesta hetta eitt sindur meir. Pætur ápostul sigur hetta:

Tí aldri er nakað profetorð komið fram av vilja menniskja; nei, drivnir av Heilaga Andanum talaðu heilagir menn Guds. 2. Pætursbr. 1,21.

Hjá Jeremias profeti, sum vit just nú eru komin til í hesum blaðgreinum, kunnu vit í tríatisætta kapitli lesa meiri nágreiniliga, hvussu skriftirnar eru komnar fram. Jeremias livdi um ta tíðina, tá ið Judaríki gekk til grundar. Tíðina frammanundan talaði hann orð til kongarnar og til fólkið, sum Gud sjálvur gav honum. Hesin kapitulin, tríatisætti, byrjar við, at fjórða árið ið Jójakim judakongur stýrir, biður Harrin Jeremias taka eina bókrullu og skriva í hana øll orðini, ið Harrin hevði talað við hann, um Ísrael, Juda og øll heidningafólkini, frá fyrsta degi , Gud hevði talað við hann- frá tí at Josias sat við stýrið -og líka til dags dato.

Jeremias sendi síðani boð eftir Baruk syni Nerija, og Baruk skrivaði, eftir sum Jeremias segði honum, í bókrullu øll orðini, ið Harrin hevði talað til hansara. Síðani bað Jeremias Baruk fara í hús Harrans og lesa úr bókrulluni fyri fólkinum. Tá ið høvdingar Ísraels hoyrdu tað, sum í bókrulluni stóð, vóru teir ræðsluslignir og søgdu við Baruk: "Sig okkum hvussu tú skrivaði alt hetta upp, eftir sum hann segði tær." Baruk svaraði:"Hann segði mær alt hetta fyri, og eg skrivaði tað við blekki í bókina."

Her kunnu vit siga, at vit hava eitt líti modell av, hvussu skriftirnar eru vorðnar til.

Tað, sum síðani hendi var, at Jójakim, sum var ein gudleysur kongur, brendi rulluna alla, sum hon var, hóast høvdingarnir , sum vóru meira gudóttandi, bønaðu hann um ikki at gera tað. Men tað endaði ikki við hesum. Tað seinasta versi í kapitlinum ljóðar soleiðis:

Jeremias tók nú aðra rullu og fekk Baruk skrivara, syni Nerija, hana; í hana skrivaði hann, eftir sum Jeremias segði honum, alt tað, sum staðið hevði í bókini, sum Jójakim kongur í Juda hevði brent. Og aftrat tí varð lagt nógv annað enn av sama slagi.

Framhald

## Brimverja í Skálavík

BJARNI DALSGAARD

Nógv umtalaða brimið hóskvøldið 30. mars gjørdi so stóran skaða í Skálavík at bæði bátar sukku, urðin (grótkastið) uttanfyri bátahylin, og bygningar fingu stóran skaða.

Nú eru tíðindir komin frá Landsverki hvussu nógv tað kostar, kr. 800.000, at gera urðina og bátahylin aftur. Tað er at vóna at hetta verður gjørt sum skjótast. 800.000 ljóðar ikki av nógvum, tað er sera bíligt, ella ótrúðliga lágt sett???

Eitt annað ið eisini er nógv átrokandi, er at leggja eina urð norðanfyri Havnagarðin, Svingið, uppi á helluni og eitt sindur út. Hetta kann ikki vera so kostnaðarmikið, tí tað er fyri allastørsta partin uppi á landi. Brimið verður leitt inn norðanfyri Havnargarðin, har tað fer eftir sléttari hellu, ið leiðir tað víðari beint uppum úti á Svinginum. Tað er til miklan ampa, her kemur nógvur sjógvur uppum, og fer tað beint oman í bátahylin. Tað er eisini hetta ið hevur brotið gamla kirkjugarðin, skatt bygningin Niðri á Møl og Fiskahúsið.

Tá longt var uppí Havnagarðin tíðliga í 70 unum, gjørdi tað, at á landnyrðingi og norði, varð aldan leidd meira inn norðafyri og fór at bróta skjótari uppum skermin úti á Svinginum. At garðurin var longdur, gjørdi eisini tað, at tað bleiv nógv kyrrari á sjálvari víkini, og í bátahylinum.

Havnagarðurin, har umleið, á Svinginum, er so gamal, at tað er ein stórur spurningur, um ikki eisini tað krevur at hann verður styrktur við einari urð norðanfyri. Farið varð undir at gera Havnagarðin stutt eftir seinna verðinskríggj.

Eg vil hervið heita á sóknarstýrið her í Skálavík um at fáa hesa urð norðanfyri Havnagarðin lagda sum skjótast, og at Løgtingið og Landstýrið taka væl ímóti okkum. Hetta er eitt mál ið sóknarstýrið ikki orkar einsamalt og kann samanberast við bakkaverjuna í Sumba.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.